


# Faroe Petroleum borar nú aftur í Norðsjónum

**Jan Müller**

16.03.2015 - 13:12

Oljan.fo

**Shango leitibrunnurin verður nú boraður í norska partinum av Norðsjónum**

Faroe Petroleum boðar frá, at nú er byrjað at bora Shango leitibrunnin, ið felagið eigur 20% av. Shango leitimiðið liggur á leitiloyvi PL627 í norska partinum av Norðsjónum, norðaliga á Utsira rygginum, og umleið 5 km frá framleiðslueindini Skirne, sum Total er fyristøðufelag fyri. Leitimiðið liggur í sama jarðarlagi, sum sera góð kolvetnisgóðska verður framleidd burturúr á Skirne kelduni.

Shango liggur á oljuseyringarleiðini hjá Skrine kelduni, sum hevur framleitt betur enn væntað. Um sama slag av gassi og dropagassi verður funnið í Shango brunninum, sum tað í Skirnu kelduni, er ætlanin at binda Shango kelduna í Skirne framleiðslueindina. Skirne framleiðslan verður førd til Heimdal framleiðslueindina, sum liggur umleið 24 km vestanfyri Skirne.

Shango leitibrunnurin verður boraður á 120 metra havdýpi. Total er fyristøðufelag við 40%, Centrica eigur 20% og Det norske eigur 20%. Leif Eriksson boripallurin verður nýttur til boringina.

Graham Stewart, forstjóri sigur í viðmerking, at hann fegnast um, at boriverkætlanin í 2015 er byrjað við tí týdningarmikla Shango brunninum. Í komandi mánaðunum verður væntandi byrjað at bora tveir uppfylgingarbrunnar á tí stóra Pil fundinum, sum Faroe eigur 25% av. Brunnarnir verða boraðir á Blink og Boomerang leitimiðunum. Síðani verður Bister leitimiðið borðað, sum liggur tætt við Njord framleiðslu undirkervið. Hóast truplar marknaðarumstøður, hevur felagið sett sær sum mál at skapa virðisøking í 2015 við eini 4 brunna boriætlan, sum øll longu er fíggjað við tøkum peningi og peningarensli frá framleiðslu.